

FÍGGJARLIGT FRÆLSI

*Nú kunnu vit av álvara fara at leggja framtíðina hjá Tvøroyri til rættis, siga býráðslimir á Tvøroyri*

# Býráðslimir á Tvøroyri hava fremstafingur á lofti

**VARSEMI** Tað verður neyðugt, at Tvøroyrar Býráð vendir hvørjari krónu, áðrenn hon verður brúkt

Áki Bertholdsen

Hóast tað sær ljósari út hjá Tvøroyrar Kommunu, eru eisini onkri fremstifingrar á lofti.

Sum tað sæst í hinari greinini her á síðuni, er Tvøroyrar Kommuna nú um at verða tikin av "svartalista" hjá Fíggjarmálaráðnum

Ein av teimum, sum kortini hevur fremstafingur á lofti, er Jaspur Vang, býráðslimur.

- Taka vit 2010, er fíggjarlógin upp á góðar 49 milliónir, tá ið alt er tikið við, og rakstrarútreiðslurnar vóru upp á góðar 37 millionir.

- Sostatt hava vit 12 milliónir eftir til útbyggingar og ábøtur.

Taka vit 2011, er fíggjarlógin upp á 47 milliónir og raksturin verður framvegis mettur at kosta 37 milliónir.

Sostatt hava vit tvær milliónir minni eftir til útbyggingar og ábøtur næsta ár, enn vit hava havt í ár.

## Ansa sera væl eftir

Býráðslimurin helt sostatt, at býráðið eigur at ansa ómetaliga væl eftir rakstrarútreiðslunum og, hvørjar skyldur, hon annars átekur sær.

Hann mælti til, at býráðið beinanvegin næsta ár setir sær fyri at endurskoða allan raksturin fyri at vita um hann ikki kann skilbøtast.

Hann spurdi serliga um kommunan hevur ráð til at átaka sær fleiri útreiðslur á eldraøkinum, sum í veruleikanum er ein landsuppgáva.

- Heldur hendan gongdin fram, verður býráðið ikki annað enn ein fyrisiting, tí tað verða ongir pengar at raðfesta við, helt Jaspur Vang.

Hesum vóru fleiri býráðslimir samdur í.

- Kommunan er so bundin fíggjarliga, at fyri ein stóran part er tað óneyðugt, at vit yvirhøvur sita her, helt Bergur Bærendsen, býráðslimur, turrisliga fyri.

## Ein beisk tíð

Bergur Bærendsen helt, at hesi seinastu árini hava verið beisk hjá býráðnum við sparingum, uppsagnum og skerjingum.

Men hann var eisini fortørnaður um, hvussu býráðið mangan varð tikið á bóli av "óbehagiligum yvirraskilsum" í sambandi við útreiðsluvøkstur á almannaøkinum og á barnaverndarøkinum.

Tí fekk hann ikki lagt nóg stóran dent á, hvussu ómetaliga stóran týdning tað hevur, at býráðið heldur fast um raksturin og serliga eigur býráðið at ansa eftir, hvørjar skyldir tað átekur sær.

**» Tað standa nógvar avbjóðingar fyri framman**

---

**23,5%**

Kommunuskatturin hjá Tvørafólki verður framvegis 23,5% næsta ár og barnafrádrátturin verður eisini 5.000 krónur fyri hvørt barnið undir 18 ár, akkurát sum í fjør.

Tað er greitt, nú Tvøroyrar Býráð hevur samtykt fíggjarætlanina fyri næsta ár.

Næsta ár verður inntøkan av vanligum kommunuskatti mett at verða eina millión hægri enn ár, men inntøkan av partafelagsskatti fer at minka 250.000 krónur, niður í eina millión.

So tilsamans fer tað at geva kommununi eina inntøku upp á 47 milliónir næsta ár.

Annars fer tað at kosta 37 milliónir at reka Tvøroyrar Kommunu næsta ár og átta milliónir skulu betalast í rentum og avdráttum, so tað er skiligt, at tað er ikki nógv eftir til íløgur.

Næsta ár ætlar býráðið at keypa fimm talgildar talvur til Tvøroyrar Skúla, samstundis sum kommunan fer upp í aftur NSR samstarvið í Suðuroy, sum kommunan annars fór burtur úr í fjør.

Á tekniskum økinum verður roknað við at koma á mál við reinum vatni til øll húski, eins og umfatandi arbeiðið uppá kloakkskipanina heldur fram.

Annars samtykti Tvøroyrar Býráð at stuðla ætlaða 50 metra langhylinum í Vági við 100 krónum fyri hvørt fólkið í kommununi.

Men býráðið setir sum treyt, at arbeiðið at byggja høllina, verður boðið út, so at eisini fyritøkur á Tvøroyri fáa høvi til at bjóða seg fram til at gera arbeiðið.